# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**MERCEDES-BENZ 190**
Árg 1961, Ellisakfar til sølu. Bilurin er í sera góðum standi. Kr. 50.000.
**Tel. 211208**



**BMW R 100 SR 1.000 CC**
Árg 1981, Km 51.000. BMW R 100 SR til sølu. Motorsúkklan er í sera góðum standi. Kr. 55.000.
**Tel. 211208**



**MITSUBISHI OUTLANDER 2,4I AUT 4X4**
Árg 2004, Km 10.000. Kr. 270.000.
Seldur fyri kunda.



**CITROEN BERLINGO 1,6I MULTI**
Árg 2002, Km 27.000. Kr. 115.000



**CITROEN XSARA 2.0HDI 110HK**
Árg 2000, Km 118.000. Kr. 110.000



**PEUGEOT 206 1,4HDI STW**
Árg 2004, Km 11.000. Kr. 155.000.
Seldur fyri kunda.



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg 2000, Km 75.000. Kr. 80.000



**VOLVO S60 2,4I**
Árg 2001, Km 60.000. Kr. 265.000.
Leður setur telefon klimaanlag fartpilot o.m.a.



**MITSUBISHI CARISMA 1,9TD 4H**
Árg nov.98, Km 85.000. Kr. 90.000



**CITROEN XSARA 2,0I EXCL**
Árg 2003, Km 25.000. Kr. 139.000.
Seldur fyri kunda.



**PEUGEOT 306 2,0GTI 170HK**
Árg 2000, Km 70.000. Kr. 140.000



**CITROEN PICASSO 2,0HDI**
Árg 2000, Km 97.000. Kr. 114.000.
Seldur fyri kunda.



**VW PASSAT 2,0I LIMOUSINE**
Árg 2002, Km 42.000. Kr. 179.000



**CITROEN XSARA 2,0I EXCL**
Árg 2004, Km 8.900. Kr. 180.000.
Seldur fyri kunda.



**CITROEN XANTIA 2,0HDI**
Árg 2000, Km 103.000. Kr. 110.000



**MERCEDES-BENZ 112CDI**
Árg apr.99, Km 98.000. Kr. 115.000.
V/mvg.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo

# Samráðingarnar slitnaðar

Eftir at hava sitið og samráðst í hálvan fimta tíma eru samráðingarnar innan fíggjarheimin slitnaðar.

Starvsfólkafelag Føroysku Sparikassanna og Elektron (SFS) og Føroya Banki/-Finansforbundet og Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnunum í Føroyum (AFF) hava samráðst um nýggjan sáttmála tey komandi tvey árini.

Undir hesum samráðingum kom AFF við einum ultimatum, ið var undir 2,4 % tey næstu tvey árini, men hetta kundi mótpartur teirra als ikki góðtaka.

Eftir hetta sendi Finansforbundet og SFS út fyrstu verkfallsávaringina, og stutta tíð eftir hetta kom fyrsta ávaringin um verkbann frá AFF.

Eitt møguligt verkfall kann í fyrsta lagi byrja um eina mánað.

- Vit eru vónbrotin, sigur Kent Petersen, næstformaður í Finansforbundet, og sum er samráðingarleiðari.

Hann vísir á, at føroysku fíggingarstovnarnir hava havt góð úrslit tey seinastu árini, og tí høvdu teir væntað, at hinir vóru meiri fyrikomandi. Vit kunnu ikki samráðast á hesum grundarlagi.

- Vit eru fyrireikað at fara í verkfall, men eisini at samráðast aftur. Hetta eigur tó at verða gjørt í virðing fyri hvørjum øðrum, sigur hann.

Enn eru ikki nýggjar samráðingar avtalaðar millum partarnar.

**sb.**

# Fíggjarstovnar boða frá verkbanni

LØNARSAMRÁÐINGAR

Sáttmálasamráðingar vóru í dag 24. mai 2005 ímillum Arbeiðsgevarafelagið hjá Føroyskum Fíggjarstovnum (AFF) og Finansforbundet - sum umboðar starvsfólkini í Føroya Banka og Trygd - og Starvsfólkafelag Sparikassana (SFS).

Eftir stuttar innleiðandi samráðingar fekk AFF handað fráboðan um verkfall frá Finansforbundet og SFS. Síðan hevur AFF boðað fakfeløgunum frá verkbanni frá í fyrsta lagi 24. juni 2005.

AFF leggur upp til eitt sáttmálaúrslit, sum tekur støði í verandi búskapargongd og útlitum. Fleiri vinnur, eitt nú ali- rækju og flakavinnurnar, hava stórar trupulleikar, úrtøkurnar hjá skipunum eru víkjandi, arbeiðsloysið er økt, og hall er á fíggjarlógini. Landsbankin metti 1. mars í ár, at vandi er fyri realari minking í búskapinum bæði í 2005 og 2006.

Marner Jacobsen, formaður í AFF vísir á, at sáttmálaúrslitini hjá arbeiðarafeløgunum og S&K endurspegla henda veruleika.

- Peningastovnarnir eru ein spegil av búskapargongdini, og tí eru útlitini ikki serliga bjørt. Men hinvegin er inflatiónin sera lág. Síðani seinastu samráðingar vóru í 2003, er brúkaraprístalið økt við einans 0,83% árliga, og tað merkir at feløgini hava havt eina munandi reallønarframgongd seinastu 2 árini, hóast úrslitini hjá peningastovnunum hava verið vánalig. Hesi viðurskifti tala fyri einum hóvligum sáttmálavøkstri hesaferð, sigur Marner Jacobsen.

Um semingsmenn koma uppí, hava hesir møguleika at útseta ein møguligan arbeiðssteðg í eina viku.

**el**